Sosialurin

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 0 6 . a p r í l 2 0 0 5



**Love Actually**

Bretskur romantiskur skemtifilmur við m.a. Hugh Grant og Emma Thompson, ið snýr seg um ymiskar útgávur av kærleikanum. Vit hitta ein einsamallan forsætisráðharra, ein høvund við hjartasorg og eitt par, ið stríðist fyri at vara um kærleikan. Øll hava tað trupult við kærleikanum.

**Fríggjadag 6. kl. 20.00**

**Vinir hóast alt**

Ninos er úr Sýria, Rasmus er dani. Hvønn tann einasta dag mugu teir verja vinalagið í einum trongum og intolerantum samfelag. Teir hava annars nógv betur hug at vera saman við damuni í frítíðini, koyra scootara og dansa hip hop. Dokumentarfilmur um tveir 15 ára gamlar vinmenn, og um ungdómsmentan í Århus V.

**Hósdag 12. kl. 21.30**



**Suðið frá tónleikinum - konsert við Suð úr Norðurlandahúsinum**

Sunnukvøldið verður høvi at hoyra fleiri framúrskarandi gospelsangir og hitt-løg frá sjeytiárunum. Tað er Klaksvíksbólkurin Suð, sum er á konsertferð saman við nøkrum av teimum dugnaligastu tónleikarunum, og úrslitið er eitt bæði stuttligt og vælljóðandi show.

Solistar eru millum aðrar: Arnfríð Lutzen, Tóra við Keldu og Steinvør Fonn.

**Sunnudag 8. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**